## Boða als ikki frá

Í morgun fór hægstirættur í Oslo undir at viðgera eitt mál, har tveir spanskir trolarar hava fingið stóra bót fyri at hava fiskað í verndarøkinum við Svalbard uttan at hava boðað norsku myndugleikunum frá. Undir viðgerðini segði verjin hjá trolarunum, at norðmenn gera mun á skipum. Hann segði, at russisk skip hava ikki boðað frá seinastu 30 árini, tá tey hava roynt í verndarøkinum, og kortini er einki teirra tikið, segði hann.

## Ikki til tímalønt

Meirilutin í trivnaðarnevndini hjá Løgtinginum vil ikki taka undir við einum uppskoti hjá Miðflokkinum um at geva tímaløntum rætt til løn, meðan tey eru heima hjá sjúkum børnum. Meirilutin, samgonguumboðini, mælir frá at samtykkja uppskotið og vísir á, at landsstýrið arbeiðis við einum tílíkum uppskoti. Tjóðveldisumboðini halda, at feløgini á arbeiðsmarknaðinum eiga málið, og Miðflokkurin í nevndini mælir til at samtykkja uppskotið.

# Føroyski ungdómurin í nógv størsta vanda

**Føroyski ferðsluungdómurin er í ovurhonds stórum vanda. Tað stendur at lesa á heimasíðuni hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd. Á heimasíðuni verður eisini víst til fleiri talvur, sum eru grundaðar á tøl hjá løgregluni í øllum Norðanlondunum**

Og tølini tala fyri seg. Sammet við aðrastaðni er ungdómurin í Føroyum tvífalt so stórum vanda sum í Danmark, Noreg, Svøríki og Finnland. Ísland bregður eitt sindur frá, men støðan har er tó langt frá so ring sum í Føroyum.

Stóri trupulleikin í Føroyum er, at ongin verulig kanning er gjørd um hesi viðurskifti, og at vit tí bara hava metingar at halda okkum til. Akkurát á hesum økinum er tó kanska vón fyri framman, tí í vár var ein kanning sett í verk, sum skal kanna ferðslumentanina hjá føroyska ungdóminum, og Jón Kragesteen, leiðari hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd, sigur seg vóna, at henda kanning fer at kasta meiri ljós á hesi viðurskifti.

**Gongur rætta vegin**

Rákið í hinum Norðanlondunum er, at talið av deyðum í ferðsluni lækkar, men Føroyar eru eisini partur av tí rákinum.

Í frágreiðingini frá ferðslutrygd stendur, at hóast tølini svinga nógv, so gongur rætta vegin, tí seinastu fimm árini er ein støðug framgongd at hóma, har talið av deyðum í ferðsluni í Føroyum er minkandi.

Men hóast røttu gongdina, so eru tey á Ráðnum fyri Ferðslutrygd langt frá nøgd. Ráðið vísir á, at vóru Føroyar á sama støði sum hini Norðanlondini, tá tað kom til teir ungu bilførararnar, so vóru tað vit sum høvdu penastu tølini í ferðsluni, tí í øllum hinum aldursbólkunum er føroysku tølini lægri enn í hinum Norðanlondunum. Tí kundu føroyingar havt penastu tølini at víst á, men tað er ikki støðan í løtuni.

Í mun til hini Norðanlondini er støðan í roynd og veru hon, at tað doyggja lutfalsliga fleiri fólk í ferðsluni í Føroyum og Íslandi enn í hinum Norðanlondunum.

Ráðið fyri Ferðslutrygd sigur, at ein møgulig frágreiðing upp á hetta er, at í hinum londunum er vanligari at fólk ganga, súkkla taka bussin ella nýta aðrar kollektivar flutningsmøguleikar, sum til dømis tok.

**Rúsdrekkakoyring**

Rúsdrekkakoyring er eisini ein stórur trupulleiki í Føroyum. Hvørt einasta vikuskifti hoyra vit um onkran ella fleiri, sum eru tikin við ov høgari promillu. Hetta sæst eisini aftur í tølunum, tí annars fallandi tølini av óhappum við fólkaskaða orsaka av rúsdrekka eru steðgaði upp.

Frá 1991 til 1995 vóru 16% av ferðsluvanlukkunum við fólkaskaða í Føroyum orsaka av rúsdrekka. 13% í tíðarskeiðinum frá 1996 til 2000 og í 2001-2005 var talið 14%, og tað er ikki heilt gott.

**Stoltleiki og skomm**

Tíðliga í septembermánaði í ár hittust norðurlendsku ráðini fyri ferðslutrygd á ársfundi í Keypmannahavn. Á hesum fundinum boðaðu føroysku umboðini frá, at løgtingið í ár hevði samtykt at seta nullhugsjónina í endamálsorðingina í føroysku ferðslulógini. Hetta vakti virðing millum hini norðanlondini.

Men stoltleikin í føroysku umboðini kendu á sær eftir hetta fánaði skjótt burtur, tá tosið fall á hvussu tey ymsu londini fyrireika ferðslutrygdararbeiði. Í Føroyum hava vit onga ferðslutrygdarætlan fyri alt landið – við tíðarásettum málsetningum og avtalum um, hvussu allir partar í felag skulu fáa ferðsluna tryggari, hvat hvør skal gera og nær.

Hetta hava vit ikki í Føroyum, og tað eftirlýsti Jón Kragesteen eisini í útvarpinum í gjár. Jón Kragesteen segði, at landsstýrismaðurin í eini handavending kann kalla allar avvarðandi partar saman at viðgera málið, og biðja partarnar syrgja fyri at gera eina ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar sum skjótast.

Bjarni Djurholm svaraði í somu tíðindasending og segði, at hann ivaðist í, um tað var neyðugt við eini felagsætlan.

– Vit hava longu staðfest hugskotslistan við 100 uppskotum, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd legði fram fyri tveimum árum síðani. Landsstýrið og løgtingið viðtók eisini henda listan og honum arbeiða vit eftir nú, greiddi Bjarni Djurholm frá í útvarpinum í gjár.




*Henda talvan vísir talið av deyðum fólkum millum 15-24 ár fyri hvønn 100.000 íbúgva. Í Føroyum búgva smá 50.000 fólk ,og tað vil siga, at tá tað í 2005 stendur, at seks fólk eru deyð í ferðsluni, so skal hetta talið býtast við tvey, og so verður er talan um trý deyðsføll millum ung í føroysku ferðsluni.*




*Orsøkin til at hini Norðanlondini ikki eru við á hesi talvu er, at tað finnast ikki slík tøl í hinum londunum.*




## Málið um samkynd fyllir útlendskar miðlar

**Ein hin størsta avísin niðri hevur málið um samkynd í Føroyum á forsíðu síni sunnudagin, og eisini íslendskir, týskir og norskir miðlar fylgja málinum**

SAMKYND
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara í Føroyum, at málið rættindini og viðferðina av teim samkynd her heima, fylla forsíður á bløðum og upptaka drúgva tíð í loftmiðlunum.

Útlendskir miðlar hava eisini latið eyguni upp fyri málinum, og farna sunnudag setti ein hin størsta danska avísin, Politiken, alla forsíðuna av til hetta. Politiken hevur havt bæði journalist og myndamann uppi í Føroyum, og forsíðan sunnudagin – dagurin tá flest fólk hava tíð at lesa blaðið – fer við eini umrøðu av tí, sum er hent her seinastu vikurnar. Ikki øll viðurskifti í greinini eru í samsvar við veruleikan í Føroyum. Millum annað verður borið fram, at tað bara eru tveir mans í Føroyum, sum av almenninginum í Føroyum eru kendir sum samkyndir, og tað er nú ikki heilt .

Í stuttum tekur greinin alt málið upp sum tað er. Tilburðurin við Rasmus Rasmussen uttanfyri Glitnir er við. Pápi hansara, Mortan Rasmussen, verður endurgivin, og tað sama verður Jenis av Rana, Finnur Helmsdal, og Føroyar verða lýstar sum eitt samfelag, har átrúnaður er av ovurstórum týdningi og har tað lógligt at forfylgja og gera mun á samkyndum og so øðrum.

Eisini Nyhedsavisen hevur havt málið frammi, og mikudagin í farnu viku fanst formaðurin í felagnum fyri samkynd í Danmark at føroyskum politikarum í hesum málinum.

**NRK ger sending**

Íslendska ríkisútvarpið hevur eisini varpað ljós á málið, tí í íslendska tónleikaheiminum er Rasmus Rasmussen sera høgt í metum. Týska blaðið Süddeutsche Zeitung – eitt blað fyri liberala lesaran - viðgerð eisini málið, har eisini løgmaður Jóannes Eidesgaard verður endurgivin at tosa um miðaldarligar standir í Føroyum.

Og at enda fara norskir miðlar í næstum eisini at varpa ljós á málið, tá NRK fer at gera eina útvarpssending um støðuna hjá samkyndum í Føroyum.

**Tilmæli hjá Ráðnum fyri Ferðslutrygd:**

## Í samband við ferðslu og ungdóm mælir RFF til:

· at ungfólk millum 18 og 25 ár skulu fáa serligt royndarkoyrikort í 2 ár við serligum treytum – Hetta skal vera partur av einari stigaskipan

· at skipað verður fyri, at náttarbussar koyra millum bygdir, so til ber hjá ungdómi at koma trygt aftur og fram í sambandi náttartiltøk.